Hervør Pálsdóttir
løgtingsmaður

Nr. 10/2020

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um ásetingarnar um neyðtøku í revsilógini, settur løgmanni, Bárði á Steig Nielsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Ætlar løgmaður at leggja fyri Løgtingið uppskot um at dagføra ásetingarnar í revsilógini um neyðtøku, har farið verður frá eini tvingsilsgrundaðari neyðtøkuáseting til eina samtykkigrundaða neyðtøkuáseting ?
2. Um ja, nær kann væntast, at eitt slíkt uppskot fer til hoyringar ?
3. Um nei, hvør er orsøkin ?
4. Hevur løgmaður ætlanir um at dagføra aðrar partar av revsilógini ?

Viðmerkingar:

Í fimm ár hava Fólkaheilsuráðið, Føroya Politi, Amnesty International og Sig frá/ Almannamálaráðið havt upplýsingarherferðir um, at sex krevur samtykki.

Veruleikin er tó tann, at ásetingarnar í revsilógini viðvíkjandi neyðtøku eru grundaðar á harðskap og tvingsil heldur enn á samtykki. Fleiri lond hava samtykkigrundaðar neyðtøkuásetingar; m.a. Svøríki, Ísland, Írland, Stóra Bretland, Belgia, umframt at Fólkatingið í næstum fer at fremja hesa dagføring.

Fyrispurningurin verður settur fyri at fáa greiðu á, um nøkur ætlan er at dagføra hesar ásetingarnar í revsilógini í Føroyum.

Á Løgtingi 2. september 2020

Hervør Pálsdóttir